

*Hesin drongurin arbeiðir í kolavinnuni í Tanzania (Mynd: ILO)*

# Milliónir arbeiða framvegis sum trælir

## Minst 12,3 milliónir fólk ymsastaðni kring heimin arbeiða hvønn dag sum trælir í vakstrargørðum, námum, verksmiðjum, sum húskallar ella sum skøkjur

### Trælahald



**Árni Joensen**
arni@sosialurin.fo

Í næstsíðstu viku ko±mu brasilsku myndugleikarnir fram á meiri enn 1.100 fólk, ið arbeiddu sum trælir í einum stórum vakstrargarði í frumskóginum. Fyri einum góðum mánaði síðani fann kinesiska løgreglan 370 fólk, sum arbeiddu sum trælir á einari tigulsteina-verksmiðju.

Trupulleikin við trælahaldi er serliga stórur í Suðurasia, men trælahald er eisini rættiliga vanligt í Latínamerika, nøkrum londum í Afrika, men eisini í Miðeystri og í Evropa arbeiða fólk undir viðurskiftum, sum kunnu samanberast við trælahald.

ST-stovnurin fyri arbeiðsviðurskiftum, ILO, hevur leingi roynt at arbeiða ímóti trælahaldi, og fyri tveimum árum síðani kom stovnurin við einari frágreiðing um støðuna kring heimin. Í hesari frágreiðingini stóð, at 12,3 milliónir fólk arbeiða sum trælir ymsastaðni í heiminum, men maðurin, sum legði frágreiðingina til rættis, Roger Plant, ásannar, at tað veruliga talið er uttan iva størri.

- Vit vita ikki við vissu, at trælahald er ein veksandi trupulleiki, tí eingin veit tað. Síðani vit gjørdu metingina, sum umfataði allan heimin, hava vit arbeitt við at kanna viðurskiftini í teimum einstøku londunum. Eitt nú eru vit komin eftir, at tað eru millum 25.000 og 40.000 trælir í Brasil, og vit frætta eisini javnan, at myndugleikarnir hava funnið trælir og fríað teir, sigur Roger Plant við Aftenposten.

### Lønin dregur

Roger Plant heldur, at trælahald er ein bygnaðartrupulleiki í nútímans búskapinum, sum lutvíst stavar frá fortíðini og lutvíst frá degnum í dag, og sum stendst av altjóðageringini.

- Lønarmunurin er so stórur, at fólk váða nógv. Eitt nú vita vit, at kinesarar hava goldið mannasmuglarum 60.000 dollarar fyri at verða smuglaðir úr Kina til USA, og tað

sigur seg sjálvt, at tá er vandin fyri misnýtslu stórur. Vit vita eisini, at vandin fyri misnýtslu veksur, tá myndugleikarnir royna at forða fremmandafólki innferðarloyvi. Men vit kunnu basa hesum, tí hetta er ein bardagi, sum heimssamfelagið kann vinna, sigur Roger Plant.

Hann vil ikki siga, hvar trælahald er mest vanligt, ella hvørji lond eru serliga ring at samstarva við fyri at fáa enda á trælahaldinum. Hinvegin vil hann fegin vísa á, at ILO hevur gott samstarv við Brasil, Kina, Pakistan, Vietnam og Peru.

### Upplýsing hjálpir

Sum nevnt hava myndugleikarnir í Brasil og Kina júst fríað hundraðtals trælir. Roger Plant sigur við Aftenposten, at felags fyri hesi fólk er, at tey eru viðkvom og koma úr fátækum korum og ofta eisini úr fjarskotnum útjaðaraøkjum. Kina og Brasil eru stór lond, og nógvastaðni liva fólk í fátækradømi. Trælahald hevur ikki verið dagligt umrøðuevni, men í Kina eru tey nú farin at tosa um tað. Í Brasil byrjaði hetta tosið fyri 10 árum síðani.

Roger Plant sigur, at tað er sera umráðandi, at myndugleikarnir taka sær av teimum, sum verða fríað úr trælahaldi, tí annars er stórur vandi fyri, at tey enda aftur sum trælir. Tí leggur ILO stóran dent á at samarbeiða við fakfeløgini og lokalar felagsskapir. Í Brasil, India, Pakistan og í Moldova hevur ILO skipað fyri stórum upplýsingarátøkum í sjónvarpi, á flogvallum og aðrastaðni, og ætlanin er at brúka somu framferð í Kina.

- Fyri fimm árum síðani var tað næstan eingin, sum tosaði um trælahald. Men viðurskiftini broytast, og í dag verður nógv tosað og skrivað um mannasmugling og annað, sum hevur samband við trælahandil og trælahald. Eisini fjølmiðlarnir gera meiri burtur úr evninum, sigur Roger Plant hjá ILO.

*(Kelda: Aftenposten)*

### Fakta

Teir flestu trælirnir arbeiða í teirri privatu vinnuni, og ILO heldur, at 1,4 milliónir fólk og serliga ungar kvinnur virka sum trælir í skøkjuvinnuni kring heimin.

2,5 milliónir fólk arbeiða sum trælir eftir boðum frá almennum myndugleikum ella hervaldinum.

Í Suðurafrika eru kvinnur serliga meint raktar orsakað av mismuni millum teir ymsu ættarbólkarnar.

Minst 2,5 milliónir fólk verða flutt millum landspartar og lond ímóti teirra vilja, og í nógvum førum enda tey í kynsligari misnýtslu. Tí mælir ILO altjóða myndugleikum til at leggja størri dent á at forða tílíkum fólkaflutningi.